# Crown við framkomnari tøkni

Toyota Crown 2008 verða gjørdir við 2,5 ella 3,5 litra V6 motorum og í hybridútgávum




**Teir fyrr so kendu Toyota Crown eru framvegis á lívi og eru í dag teir mest framkomnu bilarnir hjá Toyota. 2008 útgávan er ein slóðbrótari innan nýggjastu tøknina í bilum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Toyota ævintýrið í Evropa byrjaði við Toyota Crown, sum komu til Danmarkar í 1963 og sama árið til Føroyar. Nýggjasti Toyota Crown er 13. generatión, síðan teir fyrstu ferð komu á japanska marknaðin í 1955.

Toyota Crown 2008 er ein slóðbrótari innan framkomna tøkni í bilum við t.d. »Pre-Crash-System«, har eygnasensorar hjálpa førararnum undir koyring at umgangast samanstoytir. Hetta verður gjørt saman við eini navigatións- og trygdarskipan við førara-assistenti sum syrgir fyri øllum undir koyring sum t.d. at bilurin sjálvur setur ferðina niður, um hann nærkast eini bíðirøð ella eini gjaldsstøð.

Bilførarin fær eisini at vita í góðari tíð, um hann nærkast einum steðgiskelti ella ferðsluljósi. Bilurin er útgjørdur við infrareyðum ljósi ið sær lutir í myrkri, sum vanlig ljós ikki síggja. Talan er um eina uppfinning hjá krígsídnaðinum.

Toyota Crown hava ikki verið seldir í Evropa í nógv ár, men fleiri av hesum tøkniligu nýggjheitum koma við tíðini at síggjast í øðrum Toyota og Lexus útgávum.





*Toyota Crown innan. Crown er tann mest framkomni bilurin hjá Toyota*



# VW høvuðspartaeigari í Scania




Fyri ein prís upp á 200 svenskar krónur fyri hvørt partabrævið hava Volkswagen keypt partin hjá svensku »Investors« í lastbilaverksmiðjuni Scania fyri ein samlaðan prís upp á 17,6 milliardir svenskar krónur.

VW eiga nú 38 prosent av Scania, sum gevur teimum harvið 68,6 prosent av atkvøðunum.

Síðan 2000 hava VW verið størsti partaeigari í Scania, og undirstrika teir við hesi seinastu íløguni, at teir hava ein leiðandi leiklut í Scania og harvið í evropeiska lastbilaídnaðinum, skrivar Børsen.

**mg**